**LAGT TIL RÆTTIS:** Eydna Skaale

# 10 ting *ið stjala okkara arbeiðstíð*



SAVNSMYND

*Kann arbeiðið veruliga vera so stuttligt? Er tað ikki meiri sannlíkt, at hon júst hevur fingið eini stuttlig kjattboð frá vinkonuni, at hon hyggur at einum klippi á youtube, ella at hon klárar seg væl í Tetris?*

**5 ARBEIÐSTÍMAR** UM VIKUNA. SO NÓGVA **TÍÐ** NÝTA **FÓLK**, IÐ HAVA ATGONGD TIL **TELDU**, Á NETINUM, **MEÐAN** TEY ERU TIL **ARBEIÐIS**. TAÐ ERU **13,5%**, UM VIT ARBEIÐA **37 TÍMAR** UM VIKUNA. TAÐ ER **EIN** AMERIKANSKUR **GRANSKINGARBÓLKUR**, SUM HEVUR **KANNAÐ** AMERIKANSKA **ARBEIÐSMARKNAÐIN**, OG TEY HAVA FUNNIÐ **10** TEIR STØRSTU **ARBEIÐSTÍÐARTJÓVARNAR**

**1: Facebook**
*(1 tíma og 14 minuttir um dagin)*
Tað kemur helst ikki óvart á nakran, at Facebook er á einum klárum fyrstaplássi yvir síður, sum stjala okkara arbeiðstíð. Tað hevur eisini kostað fleiri fólkum starvið, at tey dagføra sín status við at kommentera sjóran ella keðiliga arbeiðsplássið.

**2: Online spøl**
*(33 minuttir um dagin)*
Meðan summi roykja, so spæla onnur snake, bricks ella tetris, fyri at slappa av eina løtu. Men verð varin. Smáu spølini kunnu nevniliga vera eins bindandi, sum tubbakkið. Áðrenn tú veist av, kennir tú teg noyddan at spæla.

**3: Privatur teldupostur**
*(27 minuttir um vikuna)*
Hóast t-posturin alsamt verður troðkaður burtur av sosialum netverkum sum Facebook og Twitter, sum gera samskiftið enn lættari, so taka privatu teldubrøvini tó framvegis nógv av okkara arbeiðstíð.

**4: Portalar av ymsum slagi**
*(14 minuttir um vikuna)*
Portalar sum iGoogle og MSN, sum hjálpa okkum at rógva runt á internetinum, stjala eisini fitt av okkara arbeiðsmegi.

**5: Privat kjatt**
*(13 minuttir um vikuna)*
Smá kjatt aftur og fram um líkt og ólíkt við vinir, familju ella arbeiðsfelagar enda ofta við at taka meiri av tíni arbeiðstíð, enn tað í grundini átti at gjørt.

**6: Youtube og video av ymsum slagi**
*(13 minuttir um vikuna)*
Youtube er triðmest vitjaða síðan á netinum, og alt fleiri leggja eisini leinkjur til Youtube út á Facebook, og so noyðast vit líííka at síggja, hvat tað er, vinir okkara halda vera stuttligt, syrgiligt, ræðuligt ella flóvisligt.

**7: Google**
*(11 minuttir um vikuna)*
Google hevur svarið uppá alt. Hava vit ein spurning, óansæð hvat evnið er, so fara vit beint til Google. Eisini um vit eru til arbeiðis.

**8: Shopping á netinum**
*(9 minuttir um vikuna)*
Alt fæst á netinum, og hóast vit halda okkum væl í 11 mánaðir um árið, so vísir kanningin, at vit í desember nýta nógvar arbeiðsminuttir til at vitja handilssíður sum ebay.com.

**9: Porno**
*(8 minuttir um vikuna)*
Júst hvussu tað letur seg gera, nú opin kontórlandsløg eru í hæddini, veit eg ikki, men tað eydnast hóast alt summum at hyggja at porno í arbeiðstíðini.

**10: Managerspøl**
*(7 minuttir um vikuna)*
Online managerspøl, har tú hevur ábyrgdina av einum fótbóltsliði, einum súkkluliði, einum heri, sum skal í kríggj ella av at byggja eina bygd, stjala eisini nógv av arbeiðstíðini – serliga hjá mannfólki.

## KLUMMAN



*Inna Törnroos*

# Í familju við allar Vatnsoyrar

Sum barn plagdi pápi mín at siga við meg, at eg var í familju við eina heila bygd. Tað vóru nevnliga forfedrarnir hjá okkum, sum vóru niðursetufólk í Vatnsoyrum.

Eg var stolt av at vera í familju við eina heila bygd - men helt tað samstundis vera eitt sindur løgið, at eg ikki var babtist, tá tey øll vóru tað...

Tá vit fluttu til Føroya fyri einum ári síðani, var tað hetta við familju, sum mangan fekk meg at smílast fyrstu mánaðirnar.

Sonurin fekk ein vinmann í barnagarðinum, Torstein, sum fortaldi, at abbi hansara eisini eitur Torstein og býr í Skopun. »Ná, so tú er abbasonur hann, og sonur hana, og mostur tín eitur tað...«

Ein annan dagin gjørdi eg eina samrøðu við ein, sum vísti seg at vera beiggi konuna hjá einum syskinabarni. Pedagogurin í barnagarðinum hjá yngra soninum var dóttir ein góðan vinmann hjá beiggja mínum, og soleiðis helt tað áfram.

Hóast CTD og annað lort, ið kemst av, at vit eru ov tætt í familju, er tað hóast alt sjarmerandi, at søga okkara er flættað soleiðis saman, sum hon er í Føroyum.

Tað tók nakrar mánaðir, og so var eg vand av við anonymitetin í stórbýnum og byrjaði næstan at presentera meg við at siga: »Eg eri dóttur Pedda hjá Jesar í Sørvági.« Tað fekk fleiri at nikka, enn um eg brúkti útlendska Inna Tørnroos (eftirnavnið hjá álendska manninum).

Men hóast eg elski, at vit í Føroyum kenna øll, eru í familju við tey flestu og hava meiningar um tað mesta, er anonymiteturin í stórbýnum eisini fantastiskur. At kunna ferðast nakrar kilometrar frá heiminum, og ONGIN kennir teg aftur. Tú nýtist ikki at hugsa um um klæði, hár, smyrsl ella gongulag – ella um tú dettur á rumpuna - tí ongin kennur teg aftur.

Í bústaðsøkinum í einum stórbýi er tað tó næstan sum í einari lítlari bygd – øll kenna hvønnannan og vita tað mesta.

Men at presentera meg sum »Inna hjá Pedda hjá Jesar« ja, tað virkar nokk bara í Føroyum!



## INNIHALD

2 KLUMMA: **Í FAMILJU VIÐ ALLAR VATNSOYRAR**
4 INTERVIEW: **AMARIEL NORÐOY**
6 TIPS: **SEYÐASKINN**
8 BAKGRUND: **SO NÓGVAR FERÐAPENGAR FÁA LØGTINGSFÓLK**
10 10 TING UM **ROMARIO**
11 90 SEKUND: **FINN JOHANNESEN**
12 INTERVIEW: **JUANITA SCHRØTER HOLM**
14 TIL ARBEIÐIS: **HANSA FREDERIKSBERG**
15 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
16 BAKGRUND: **JOHN LENNON 70 ÁR**
18 ÚTISETIN: **NICOLAJ FALCK**
19 MIÐLAMJARR: **TAÐ SIGA TEY Á FACEBOOK OG Í MIÐLUNUM**
23 TAÐ HENDIR: **KONSERTIR, TILTØK, BØKUR OG ANNAÐ**
24 VIKUMYNDIN

VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Juanita Schrøter Holm / Jens Kristian Vang